Fundarfrásøgn - Skúlastýrisfundur í Hoyvíkar skúla

5. november 2025 kl. 17.30

Luttakarar

Anna Maria Reinert Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Trygvi í Liða, Theodor Eli Dam Olsen, Mass Hoydal, Elin Maria Olsen og Margith Lamhauge.

1. Støða viðvíkjandi lærarum, ið hava fingið skeld frá foreldrum

Skúlastýrið umrøddi støðuna, sum er uppstaðin viðv. lærarum, ið hava upplivað at fáa skeld frá foreldrum.

- Arbeitt verður víðari við málinum.
- Ein virkisætlan skal gerast.
- Anna Maria sendir boð til Undirvísingarstýrið um støðuna.
- Uppskot var lagt fram, um at boð til næmingar altíð skulu fara um skrivstovuna, so skrivarin kann bera boðini víðari.
    - Hetta ber ikki til í løtuni, tí skrivstovufólkið er sjúkrameldað fram til februar. Hetta verður tikið upp aftur, tá skrivarin er aftur.

2. Felags foreldrafundur í Skúlanum við Løgmannabreyt

Trygvi hevði framløgu á felags foreldrafundinum fundinum í SVL og legði merki til teirra samstarv við Tórshavnar Musikkskúla. Hann ber fram at hetta eisini er ynskiligt fyri Hoyvíkar skúla.

- Víst varð á, at skúlin er sinnaður at menna samstarv við Musikkskúlan, um skúlastýrið ynskir tað og lærararnir eru samdir.
- Tørvur er á hølum. Møguleikar, sum vórðu nevndir:
    - At seta bingjur upp til tónleikaundirvísing.
    - At nýta kirkjuna til undirvísing.
    - At kanna møguleikan fyri bussleið beinleiðis til Hátún.
- Mass, Trygvi og Theodor seta seg í samband við Tórshavnar Musikkskúla um møguleikarnar.
- Málið verður tikið upp aftur á næsta fundi.

3. Jólahald

Leiðslan legði fram tveir møguleikar fyri námsfrøðiliga ráðnum:

1. At býta jólahaldið í tvey: eitt fyri yngru og eitt fyri eldru næmingarnar, við hugna ímillum tiltøkini.
2. At yngsti flokkur í hvørjari deild hevur hugna á skúlanum, meðan aðrir flokkar eru í kirkjuni. Aftan á møtast øll í floksstovunum til hugna.

- Lærararnir ynsktu at halda fram sum seinasta ári: Yngsti flokkur í hvørjari deild hevur hugna í skúlanum, meðan hini eru í kirkjuni – síðan eru øll felags í kirkjuni. Hetta má royndarkoyrast fleiri ferðir áðrenn meting kann gerast.
    - Skúlastýrið bar fram, at tað er umboð foreldranna, og at foreldrini ynskja eitt felags foreldratiltak.
    - Kunningarskrivið fyri jólahaldið 2025 skal koma frá leiðsluni.
- Tosað var um, um kirkjan er nóg stór til eitt felags tiltak.

4. Vitjan frá borgarstjóranum

Vitjanin er útsett til 17. november kl. 14.00.

5. Felags foreldrafundur í januar

- Snildfonir ávirka sambandið millum næmingar og lærarar.
- Børn og vaksin lesa minni og brúka minni public service.
- Evnið kann fevna um búgving, talgildar miðlar og yvirinformatión.
- Spurningurin varð settur: *Hvat er trupulleikin við snildfonum í skúlanum? Eigur ein at seta bann fyri teimum?*
    - Fram komu ymisk sjónarmið:
        - Næmingar síggja nógv, sum tey ikki eru búgvin til.
        - Lærarar eru illa vardir.
        - Telefonirnar eru truplar at savna inn og skeikla undirvísing og relatiónir.
        - Skúlin kann ikki kappast við telefonina.
        - Víst varð á týdningin av digitalum dannilsi, men eisini at tað krevur analogt grundarlag.
        - Í 1. flokki verður SSP-fundurin brúktur sum pallur fyri kjak um, nær børn sleppa at fáa snildfon.
        - Eisini varð nevnt, at børn eisini læra nógv á talgildu miðlunum, og at tey skulu búgvast til nútíðar samfelagið.

- Nýggj grein vísir, at børn, ið eru virkin á talgildum amboðum, kunnu hava hægri IQ.

6. Ymiskt

- Anna Maria gjørdi vart við, at óvist er, um fimleikarhøllin verður vaskað. Hon er sera skitin.

Fundurin er lokin: kl 19.00